

## Virðingin er burtur

**Løgmaður og Jørgen Niclasen eiga at reinsa seg, fyri at fólk kunnu fáa virðing fyri teimum aftur, heldur Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

– Tað er tyngjandi fyri landsstýrið, at álvarsamar skuldsetingar hanga í luftini uttan at verða vístar aftur. Løgmaður og Jørgen Niclasen eiga at reinsa seg, tí í løtuni stendur øll virðingin fyri embætinum upp á spæl.

Tað sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna í landsins størsta flokki, Sambandsflokkinum.

– Eg havi ilt við at skilja, hvat tað er, sum gongur fyri seg í samgonguni í løtuni, men tað er púra vist, at tað sær ikki gott út úteftir, sigur hon.

– Teir ákærdu áttu at reinsa seg, tí so var tann trupulleikin burtur. Tað er stór ábygrd at røkja ein landsstýrissess, og tað eiga fólkafloksmenninir eisini at hugsa um.

### Reinsa luftina

Sambandsflokkurin hevur ongar ítøkiligar ætlanir um at reisa misálit ímóti løgmanni ella Jørgeni Niclasen, men Lisbeth L. Petersen heldur, at tað kann koma ein stemningur fyri einum misáliti, sum støðan er í løtuni.

– Fólkið og landið hava betur uppiborið enn hetta. Tað besta hevði verið, um landsstýrið fór fram, men ætla teir at halda fram við samgonguni, so eiga teir fyrst at reinsa luftina, heldur forkvinnan í Sambandsflokkinum.

# Tjóðveldisflokkurin stuðlar samgonguni

**Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur, at hansara flokkur altíð heldur politiskar avtalur, og soleiðis er eisini við nýggju samgonguni**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

– Tjóðveldisflokkurin heldur altíð politiskar avtalur, og allir tinglimir floksins standa sjálvsagt aftanfyri samgonguavtaluna, sum er grundarlagið undir at skipa landsstýrið.

Tað er høvuðsboðskapurinum í svarinum, sum Tjóðveldisflokkurin mánadagin sendi Fólkaflokkinum, sum vildi hava størsta samgonguflokkin at vátta stuðulin til samgonguna í kjalarvørrinum frá skrivingini hjá Tórbirni Jacobsen.



*Høgni Hoydal sigur, at Tjóðveldisflokkurin stuðlar samgonguni, men flokkurin vil einki siga um skrivingina hjá Tórbirni Jacobsen, soleiðis sum Fólkaflokkurin annars kravdi*

Høgni Hoydal hevur skrivað brævið vegna Tjóðveldisflokkin, og hann sigur, at hansara flokkur leggur dent á, at landsstýrið í verki fremur tær politisku semjur, sum eru niðurfeldar í samgonguskjalinum.

– Tjóðveldisflokkurin heldur seg til og tekur ábyrgd av øllum málum, sum hava beinleiðis við politiskar avtalur og við politiska ella løgfrøðisliga embætisførslu at gera. Tjóðveldisflokkurin viðger ikki mál, sum verða reist í øðrum høpi, ið persónar sjálvir ábyrgdast fyri.

Við hesum endurtekur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum enn einaferð boðskapin um, at Tjóðveldisflokkurin framvegis stuðlar samgonguni, men at flokkurin ikki vil viðgera skrivingina hjá Tórbirni Jacobsen.

### Breckmann misnøgdur

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur ikki hug at gera viðmerkingar til svarið frá Tjóðveldisflokkinum, fyrr enn Fólkaflokkurin hevur viðgjørt viðgjørt svari á fundi, sum í fyrsta lagi kann verða hildin í dag.

Men løgmaður sigur seg tulka svarið frá Høgna Hoydal soleiðis, at Tjóðveldisflokkurin framvegis stuðlar samgonguni.

Formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum er alt annað enn fegin um svarið frá Tjóðveldisflokkinum.

Við Útvarpið segði Óli Breckmann mánakvøldið, at tað er harmiligt, at Tjóðveldisflokkurin ikki loysir trupulleikan, at teir hava ein beitingarhund í flokkinum, sum teir ikki kennast við, men sum teir kortini lata dálka ikki bert Anfinn Kallsberg, men eisini løgmansembætið.

Óli Breckmann segði eisini, at í løtuni kann løgmaður ikki rokna við Tórbirni Jacobsen sum 17. tingmanni hjá Fólkaflokkinum, og tí eru tað bert 16 tingmenn aftan fyri samgonguna júst nú.

# Ivin um løgmann má burtur

**– Tað er sera álvarsamt, at samgongan nú velur at ignorera álvarsomu skuldsetingarnar móti løgmanni, sigur Jóannes Eidesgaard. Javnaðarflokkurin ætlar at viðgera málið á ólavsøku**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Formaðurin í Javnaðarflokkinum heldur, at gongdin í málinum um skrivingina hjá Tórbirni Jacobsen er so óheppin, sum hon kundi verða.

– Tað eru bara tvær loysnir á trupulleikanum, og tað er, at Anfinn Kallsberg reinsar seg, ella at Tórbjørn Jacobsen leggur prógv á borðið. Tá ein slíkur ivi er reistur móti løgmansembætinum, kann hann ikki sleppa at hanga í leysum lofti, sigur Jóannes Eidesgaard.



*– Eg kann bara koma til ta niðurstøðu, at fyri Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin hevur tað størri týdning at halda fast um maktina enn at fara reiðiliga fram, heldur Jóannes Eidesgaard*

– Men tað, sum hendir nú, er, at Fólkaflokkurin vil einki gera við málið, og Tjóðveldisflokkurin letur sum um einki er hent. Hetta byrjaði sum eitt samgongumál, men nú er tað eitt mál fyri alla tjóðina, og tí fer Javnaðarflokkurin at viðgera málið, tá vit hittast aftur á ólavsøku.

Allir spurningar skulu viðgerast í Javnaðarflokkinum, eisini eitt møguligt misálit.

### Snýr seg um maktina

– Eg kann bara koma til ta niðurstøðu, at fyri Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin hevur tað størri týdning at halda fast um maktina enn at fara reiðiliga fram, heldur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at tað hevði ikki borið til í nøkrum øðrum framkomnum landi, at ríkisleiðarin var skuldsettur á hendan hátt, og at ivin síðani slapp at hanga í leysum lofti.

– Eg vil ikki taka partí fyri nøkrum í hesum máli, men her er ein ivi sáddur, og tað skapar ein álvarsaman trupulleika. Hetta er eisini ein spurningur um okkara umdømi í sum tjóð, og tað má kennast óhugaligt hjá fólki at skulu halda tjóðarhátíðina við hesi støðu, sigur Jóannes Eidesgaard.



# Fiskavirking seljast undir einum

**Føroya Fiskavirking verður í heyst lýst til sølu, og ætlanin er at selja meirilutan – og helst alt. Selt verður til hægstbjóðandi, og hetta nýtist ikki at vera føroyskir keyparar. Alt Fiskavirking, sum tað er, verður selt undir einum**

FISKAVIRKING
*Heri á Røgvi*



*— Tað er ikki vist, at Fiskavirking verður selt eftir trimum mánaðum. Vit vilja sjálvandi selja, um tað er eitt nóg høgt boð. Er tað eitt ófrávíkiligt politiskt krav, at Fiskavirking skal seljast á einum virðisbrævamarknað, so er hetta nýtt fyri nevndina í Framtaksgrunninum, sigur Niels W. Poulsen*

Nógv rok hevur verið seinastu tíðina um privatiseringar av ognunum hjá landinum – ella rættari sagt hjá Framtaksgrunninum. Nú er tað komið so langt ávegis, at nevndin í Framtaksgrunninum hevur avgjørt at fara undir at selja Føroya Fiskavirking, ið grunnurin eigur alt, sum tað er.

Framtaksgrunnur Føroya setti í 1997 60 mió. kr. í Føroya Fiskavirking, sum tá var illa rakt av kreppuárunum. Men síðani er vent í holuni, og Føroya Fiskavirking hevur seinastu 4 árini havt góðar 56 milliónir í yvirskoti. 2001 gav Framtaksgrunni Føroya seks milliónir í vinningsbýti, soleiðis at íløgan hjá grunninum stendur seg rættiliga væl. Vert er eisini at nevna, at góðu fiskaprísirnir hava havt við sær, at samlaða sølan hjá Fiskavirking er voksin við góðum 120 mió. frá 1999 til 2001.

Í tráð við politiska viljan og ætlaninar við Framtaksgrunninum, so verður Føroya Fiskavirking nú lýst at vera til sølu. Næstu mánaðirnar verður farið undir at fyrireika søluna av Fiskavirking. Fyrireikingar umfata fyri tað nógva at gera sokallað sølutilfar, har ein prísur, t.e. ein prísur, sum er nøgtandi fyri Framtaksgrunnin, eisini skal ásetast. Fær Framtaksgrunnurin ikki henda prís, so verður Føroya Fiskavirking heilt einfalt ikki selt.

### Í einum

Formaðurin fyri Framtaksgrunn Føroya, Niels Winther Poulsen, sigur, at tá teir nú hava fingið eina klára útmelding frá Landsstýrinum, at teir eru farnir undir at fyrireika eina sølu av Fiskavirking.

Føroya Fiskavirking skal seljast sum ein eind. Framtaksgrunnurin sigur í tíðindaskrivi, at grunnurin teir næstu 2-3 mánaðirnar fer at gera neyðugu fyrireikingarnar til søluna.

Niels W. Poulsen metir, at Framtaksgrunnurin kann fáa meira fyri Fiskavirking við at selja tað vanligt ístaðinfyri á einum virðisbrævamarknaði, men tað er væl møguligt at selja Fiskavirking á einum tílíkum marknaði, staðfestir hann.

— Tað er ikki vist, at Fiskavirking verður selt eftir trimum mánaðum. Vit vilja sjálvandi selja, um tað er eitt nóg høgt boð. Er tað eitt ófrávíkiligt politiskt krav, at Fiskavirking skal seljast á einum virðisbrævamarknað, so er hetta nýtt fyri nevndina í Framtaksgrunninum, sigur Niels W. Poulsen.

Ásettur verður ein minstiprísur, og miðað verður ímóti at selja í minsta lagið meirilutan av partapeninginunm, men Niels W. Poulsen dylir ikki fyri, at teir fegnir vilja selja alt.

Er boðið nóg størst, so kann Føroya Fiskavirking væl fara á útlendskar hendur.

— Um vit ikki selja til hægstbjóðandi, so koma vit í endurgjaldsskyldu til grunnin. Vit skulu selja til hægstbjóðandi. Vit royna at boða frá í so góðari tíð sum gjørligt, at Fiskavirking er til sølu, soleiðis at møguligir føroyskir keyparar kunnu fyrireika seg, sigur Niels W. Poulsen, sum leggur dent á, at tað er ein politiskur spurningur, um tað bara skulu vera føroysk virki og føroyingar, ið kunnu bjóða uppá Fiskavirking.

Niels W. Poulsen sigur seg ikki duga at siga, hvør minstiprísurin verður, tí har skulu nógvar útrokningar gerast.

— Tað skal vera púra alment, hvørjar treytirnar eru, so øll hava ein møguliga at keypa, sigur Niels W. Poulsen.

— Tað tykist at vera politiskur vilji aftanfyri, at Fiskavirking verður selt í einum. Tað er kortini vit, ið taka tað avgerðina, og Landsstýrið hevur sagt, at tað leggur ikki uppí. Leiðslan í Fiskavirking er eisini samd við hesari avgerðini, og tað væl eisini tað besta fyri Fiskavirking, at tað verður einskilt, sigur Niels W. Poulsen.

### Aftur í grunnin

Niels W. Poulsen væntar, at tað væl møguligt verður talan um eitt samtak av keyparum, sum fer at keypa Føroya Fiskavirking. Framtaksgrunnurin tekur tó ikki hædd fyri, um keypararnir eru fleiri í bólki ella bara ein.

Hyggja vit leysliga eftir Føroya Fiskavirking, so er tað eyðsæð, at tað skulu nakað nógvar milliónir á borðið fyri at keypa tað heilt. Talan er um eina yvirskotsforrætning, sum hevur havt stórt yvirskot seinastu árini.

Eginpeningurin er 103 mió. Skuldin í alt er 119 mió (1. januar 2002) og ognirnar í alt hava eitt virðið áljóðandi 223 mió (1. januar 2002). Ognirnar hjá Føroya Fiskavirking fevna um tey seks virkini, ið Fiskavirking sjálvt rekur: á Toftum, Runavík, Vestmanna, Miðvág, Tórshavn og á Tvøroyri. Eisini eigur Føroya Fiskavirking eitt virki í Vági, ið er langtíðar leiga. Samanlagt eru 603 ársverk í Føroya Fiskavirking. Upprunaliga vóru 19 virki í Fiskavirking eftir saneringina í kreppuárunum.

Peningurin av einari møguligari sølu av Fiskavirking fer aftur í Framtaksgrunnin, sum – verður hann ikki avtikin – skal nýta peningi til at gera nýggjar íløgur í føroyskt vinnulív. Framtaksgrunnurin skyldar landskassanum 93 mió. kr.

### Kann selja

Ivi er eisini reistur um, hvørt formaðurin fyri Framtaksgrunnin hevur neyðugu fortreytirnar til at standa fyri einari sølu av Fiskavirking, tí hann í sínum starvi sum advokatur kann umboða møguligar keyparar.

— Tað er sjálvsagt, at skal formaðurin í Framtaksgrunnurin umboða grunnin í einskiljingum av ognunum hjá sær, so kann hann ikki umboða keyparan, sigur Niels W. Poulsen.

— Er tað nakað generelt misálit á formannin í Framtaksgrunninum, so eigur tað ikki at steðga, at einskiljingin fer fram, sigur Niels W. Poulsen, sum vísir á, at formaðurin kann vera skiftur út, men hetta eigur ikki at ávirka prosessina.

Tórbjørn Jacobsen:

# Virðisbrævamarknaðurin er ein treyt

**Tjóðveldisflokkurin setir tað sum eina treyt, at samgonguskjalið verður fylgt, og at bíða verður eftir einum virðisbrævamarknaði, áðrenn farið verður undir at einskilja Føroya Fiskavirking. — Ger Bjarni Djurholm ikki, sum tað stendur í samgonguskjalinum, so hevur hann eitt stórt problem, sigur Tórbjørn Jacobsen**

EINSKILJING
*Heri á Røgvi*

"Tá ið virðisbrævamarknaður er settur á stovn, verður farið undir varliga og gjøgnumskygda einskiljing av vinnuligu fyritøkunum hjá landinum"

Hetta stendur greitt at lesa í samgonguskjalinum, ið Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin skrivaðu undir fyri fáun mánaðum síðani.

Orðingarnar í samgonguskjalinum ætlar Tjóðveldisflokkurin eisini at fylgja.

— Tað stendur heilt greitt í samgonguskjalinum, at virðisbrævamarknaðurin skal setast á stovn, áðrenn farið verður undir at einskilja almennar fyritøkur. Vit halda allar avtalur, og ger Bjarni Djurholm ikki, sum tað stendur í samgonguskjalinum, so hevur hann eitt stórt problem, sigur Tórbjørn Jacobsen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin.

Eisini Kristina Háfoss, tingkvinna fyri Tjóðveldisflokkin, sigur í lesarabrævi í gjár, at einskiljingar kunnu bíða eftir virðisbrævamarknaði.

Tórbjrøn Jacobsen ger púra greitt, at Virðisbrævamarknaðurin er treyt fyri Tjóðveldisflokkin tekur undir við ætlanini at privatisera Føroya Fiskavirking.

Meldingarnar higartil hava ljóðað, at tekniski parturin til VMF (Virðisbrævamarknaða Føroya) skuldi vera klárur í ár, men óvist var, nær virksemið kundi fara ígongd, ikki minst tí eingi virðisbrøv eru at handla við.

### Samdur

Tórbjørn Jacobsen er kortini ikki ósamdur við tí sjónarmiðið, at Føroya Fiskavirking eigur at verða einskilt.

— Eg eri samdur í tí, at primer-vinnan eigur at verða einskilt, tí landið eigur einki at hava við hetta at gera, og politiskt er tað stórt sæð komið upp á pláss, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann heldur tó, at vit hava í so lætt við at gloyma, hvussu nógv stríð er lagt í Fiskavirking.

— Vit mugu minnast til, at tað var tann føroyski skattgjaldarin, sum noyddist at gjalda fyri hetta. Hetta málið er ikki akut, og vit kunnu sagtans bíða, sigur Tórbjørn Jacobsen.



*Tórbjørn Jacobsen ger greitt, at Tjóðveldisflokkurin setir sum krav, at Føroya Fiskavirking skal seljast á einum virðisbrævamarknaði*

Viðvíkjandi tí spurninginum, hvørt útlendingar skulu kunna keypa, sigur Tórbjørn Jacobsen, at var alt púra frælst við handlum um landamørk, so var eingin trupulleiki.

— Vit síggja í dag, at øll verja sítt: amerikanarar, ES og íslendarar royna allir at verja sítt. Vit kunnu ikki keypa eitt virki yviri í Íslandi, men teir kunnu keypa Fiskavirking. Vit vera noydd at fylgja við øðrum. Tað hevði eisini verið ein syrgilig søga, um Fiskavirking fór av føroyskum hondum orsakað av einum eitt sindur hægri boðið, sigur Tórbjørn Jacobsen.